# Atlantic Petroleum fyrir

**Kapitalhækkingin er komin undir land. Nú ræður um at umleggja stuttfreistaðu skuldina til langfreistaða. Oljufólk hava fingið størri leiklut í felagnum. Høvuðsdentur verður nú lagdur á at menna felagið til at finna nýggjar oljugoymslur. Sosialurin hevur tosað við nýggja nevndarformannin Birgir Durhuus um framtíðina**



*Nevnd og leiðsla í Atlantic Petroleum á strategifundi í Keypmannhavn. Aftast fv. Birgir Durhuus, nevndarformaður, Jan Evensen, nevndarlim skrivstovufólk, Alyson Harding og Richard Hardmann úr Bretlandi, Diana Leo, nevndarlimur og Sigurd í Jákupsstovu, stjóri*

OLJUFELØG
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Tað er skjótt eitt hálvt ár síðani, at nýggja nevndin í Atlantic Petroleum tók við. Síðani tá eru stórar broytingar hendar í felagnum. Fíggjarstjórin segði seg úr starvi, og forstjórin varð biðin um at fara. Undan tí vórðu tríggir av nevndarlimunum skiftir út. Nýggjasta hendingin í felagnum er so tann, at tað hevur eydnast at fáa 180 mill. kr. Í nýggjum partapeningi.

Í farnu viku var nevndar- og strategifundur í Keypmannahavn, og tá varð roynt at taka samanum og seta út í kortið av nýggjum.

Vit hittu nevndarformannin undan fundinum.

Nýggi nevndarformaðurin Birgir Durhuus er fegin um ta arbeiðsuppgávu og álit hann hevur fingið litið upp í hendi. Hann ber ikki ótta fyri at fara undir tær bæði krevjandi og spennandi avbjóðingar, sum liggja fyri framman. Hann hevur sjálvur drúgvar royndir í fíggjarverðini. Nýggja álitisstarvið krevur av honum, at hann evnar hetta at síggja møguleikar samstundis sum man hevur bæði bein trygt á jørðini.

Hann kendi lítil til felagið, áðrenn hann varð biðin um at átaka sær ta stóru uppgávuna at standa á odda fyri felagnum.

## Fíggjarligir trupulleikar

-Tað felagið eg kom til var eitt Atlantic Petroleum við stórum trupulleikum, sum skuldu loysast her og nú og áðrenn nakað annað kundi gerast. Skuldin var vorðin ov stór, og skuldin varð ov stuttfreistað. Tað ber ikki til hjá einum felag, sum ætlar at liva uppá longri sikt at blíva við til at rulla eina stuttfreistaða skuld frammanfyri seg.

Tað var tí at fáa tær báðar uppgávurnar loystar, áðrenn hugsingur var um at gera nakað annað hjá nýggju nevndini, sum fór til arbeiðis í juli.

Kreditorarnir, teir føroysku peningastovnarnir, føroyskar tryggingar og privatpersónar, høvdu eisini sett sum krav fyri at halda fram í Atlantic Petroleum, at skuldarmálið bleiv loyst. Eitt nú høvdu teir lagt restriktiónir í, hvat felagið slapp at fyritaka sær, og høvdu teir eisini sett krøv til nevndarbroyting. Og tí var uppgávan hjá nýggju nevndini sera greið.

## Væl nøgdur

Og nú tað nærkast ársenda er nýggi nevndarformaðurin rímuliga væl nøgdur. –Vit hava minkað skuldina við út við 200 mill. kr., og tað er til at føla uppá hjá slíkum felag. Vit eru sostatt komin til eitt støði, har tað ber til at arbeiða út frá verandi skuld. Í sambandi við kapitalhækkanina søgdu teir báðir kreditorarnir, sum nú eru eftir, Føroya Banki og Eik, at eydnaðist hon, so vildu teir síggja positivt uppá at leggja skuldina um frá stuttfreistaðari til langfreistaða.

Og tá tað er komið uppá pláss, so eru eisini trupulleikarnir við sjálvum kapitalstrukturinum loystir.

- Tá hava vit eitt felag, sum hevur rættiliga stóra inntøku uppá umleið 30 mill. kr. um mánaðin, sum hevur lítlar útreiðslur og sum hevur ein kapitalstruktur, sum ger, at man veruliga kann byrja at arbeiða aftur.

Tað varð so eisini tað stuttfreistaða málið hjá nýggju nevndini at gera felagið arbeiðsført aftur.

## Sterkir og veikir

Birgir Durhuus viðgongur, at meðan teir eru vornir sterkir á kapitaløkinum, so eru teir veikir, tá tað snýr seg um at brúka pengarnar. Við hesum sipar hann fyrst og fremst til at kunna fara undir nýggja leiting eftir kolvetnum.

Sum støðan er nú so verða inntøkurnar brúktar til at niðurgjalda skuld.

- Men eitt oljufelag er til fyri at finna og framleiða olju, og tað brúka vit sjálvandi orku til. Vit hyggja tí eisini eftir, um vit hava tey røttu fólkini til tað vit ætla okkum. Og her hevur man longu sæð avleiðingar, har tað er broytt í uppstillingini.

Í løtuni verður kannað, um tað ber til at økja um inntøkurnar rundan um tey felt, har felagið arbeiðir í dag. Har eru møguleikar ásannar nevndarformaðurin. Bransjan í dag er soleiðis háttað, at nógv feløg hava lítið av pengum men nógv leitiloyvi. Møguleikarnir at koma inn í leitiloyvi eru til steðar, men tað er sera umráðandi, at vit hava eina strategi, soleiðis at tað vit gera er rætt og kastar nakað av sær leggur hann aftrat.

Atlantic Petroleum framleiðir í løtuni úr tveimum feltum, sum eru rættiliga stabil. Tey eru Ettrick og Chesnut. Tað, sum liggur næst fyri hjá felagnum í 2010, er at seta hol á enn eitt felt, Blackbird, sum liggur tætt við Ettrick feltið. Har verður so boraður ein avmarkingarbrunnur. Spurningurin hevur verið, um ein skal gera eina sidetrackboring frá Ettrick ella um man skal fara inn við nýggjum palli. Helst verður talan um eina síðusporboring frá Ettrick.

## Nýggjar goymslur

Nýggi nevnarformaðurin í Atlantic Petroleum viðgongur, at høvuðstrupulleikin í dag er ikki tann fíggjarligi men komandi goymslur. – Vit hava eina avmarkaða framleiðslu og vita, nær vit enda hesa. Vit verða tí noydd til at tryggja, at vit fáa eina framleiðslu, sum kann koma ístaðin fyri ta verandi, tá hon steðgar.

Hetta er nakað, sum arbeitt verður við og sum skal vera komið uppá pláss helst innan fyri eitt hálvt ár. Tey kanna eisini aðrar møguleikar eitt nú at fara uppí onnur samtøk. Birgir Durhuus váttar, at tað eru aðrir møguleikar á marknaðinum, men tey eru fyrst noydd at hava eina heildarstrategi.

## Leita við Føroyar

- Hvussu eru so útlitini fyri, at felagið verður við í leiting við Føroyar komandi árini?

Birgir Durhuus sigur, at tað er framvegis eitt av teirra málum at vera við til at leita eftir olju í Føroyum, tó at hetta ikki er tað, sum stendur næst fyri. Felagið er saman við norska Sagex í tveimum loyvum, sum júst eru longd, og har seismikkur verður tulkaður í løtuni. Roynt verður at búna hesi loyvini og síðani kanna, um til ber at fáa onnur feløg uppí fyri á tann hátt at minka um váðan hjá bæði Atlantic Petroleum og Sagex. Haraftrat er felagið við í tveimum loyvum, har Statoil er fyristøðufelag.

- Taka vit samanum, so hevur Atlantic Petroleum loyst sínar avbjóðingar